# Fiskiskipaflotin hjá hjúnunum, Elisabeth og Anfinni Olsen

**Eingin vil upplýsa keypsprísin fyri Krúnborg og tey veiðirættindi, sum skipið hevur, men millum manna skilst, at prísurin helst er omanfyri 300 mió krónur**

SKIPAFLOTI
Vilmund Jacobsen
Myndir: Skipalistin

Við keypinum av kombineraða nóta-og trolskipinum, Krúnborg, eiga feløgini, sum hjúnini, Elisabeth Eldevig Olsen og Anfinn Olsen saman við íslendska stórfelagnum, Samherja, varða av, nú tvey uppsjóvarskip, ein flakatrolara, fýra ísfiskatrolarar og eitt línuskip.

Í felagnum Framherji, sum varðar av størra helminginum av partapeninginum, eiga hjúnini hvør sín triðing, meðan íslenska felagið, Samherji, eigur ein triðing.

### Eingin prísur

Hvørki keypari ella seljari vilja upplýsa prísin, sum Krúnborg er seld fyri, men millum manna sigst, at talan er um størstu íløgu í føroyskari fiskiskipasøgu.

Tøl sum meira 300 mió. krónur fyri skip og veiðirættindi eru nevnd, men eingin vil vátta hetta. Upplýst er tó, at íslendingar bjóðaðu 185 mió. krónur fyri Krúnborg, men tá tóku eigararnir ikki av.

Onkur hevur mett, at keypsprísurin helst er einar tvífalt so stórur, sum virðið er á sjálvum skipinum.

### Eingin "sorg"

Tað var sorgardagur í Sørvági, tá ið ein meiriluti av partaeigarunum í P/F Vesturvón avgjørdu at selja flaggskipið í Vágum, men nú Framherji eisini hevur keypt flaggskipið í føroyska uppsjóvarflotanum, hoyrist einki um sorgardagar í høvuðsstaðarøkinum.

Hetta er kanska heldur ikki so undarligt, tí stórur munur er á, hvønn týdning Vesturvón hevði fyri Sørvág í mun til týdningin, Krúnborg hevur fyri høvuðsstaðarøkið.

### Átta skip

Skipini, sum hjúnini, Elisabeth E. Olsen og Annfinn Olsen saman við íslendingum varða av, eru nú átta í tali. Hesi eru pelagisku skipini, Krúnborg og Høgaberg, flakatrolarin Vesturvón, ísfiskatrolararnir, Akranes, Dragasund, Vesturleiki og Vestursøki – og áttanda skipið er línuskipið, Stapin.



*Kombineraða trol-og nótaskipið, Krúnborg (1999), er nýggjasta fiskifarið hjá P/F Framherja*



*Vesturvón (1987) er flakatrolari – og næstseinasta skipið, sum felagið hevur keypt*



*Høgaberg (1979) var fyrsta pelagiska skipið hjá felagnum*



*Akranes (1980) er ísfiskatrolari, fyrrverandi Topas og Leivur í Hesti*



*Dragasund (1981) er ísfiskatrolari, fyrrverandi Sardis og Dragaberg*



*Vesturleiki (1990) er ísfiskatrolari, fyrrverandi Polarhav*



*Vestursøki (1990) er ísfiskatrolari, fyrrverandi Stjørnan*



*Stapin (1988) er línuskip, fyrrverandi Gandi (úr Íslandi)*

Jógvan I. Olsen:

# – Ein onnur tíð

**– Hóast torført er at fylgja við øllum í dag, nú alt gongur so skjótt, er tað hugaligt at síggja, at tað eru fólk, sum vilja royna – eisini í hesum nýggju tíðum, sigur Jógvan I. Olsen, fyrrverandi skipari og løgtingsmaður**

PRÁT
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Jógvan I. Olsen, fyrrverandi skipari og løgtingsmaður, er pápi Anfinn Olsen, sum saman við konu síni, Elisabeth Eldevig Olsen, nú varða av heili átta skipum í føroyska fiskiskipaflotanum.

Jógvan var kendur sum skipari, og mongu árini á tingi gjørdu hann eisini kendan í politikki, har hann eitt skifti eisini var landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Pápi Elisabeth er heldur ikki hvør sum helst. Ditleif Eldevig var í fleiri ár stjóri á Fiskamarknaði Føroya og var við til at byggja upp eina føroyska uppboðssøluskipan. Hann hevur eisini verið við í øðrum vinnulívi og var eitt nú stjóri á Havsbrún í fleiri ár, har hann var við til at leggja lunnar undir felagið.

Mammurnar hjá Elisabeth og Anfinni, Rosa og Hildibjørg, eru ikki umrøddar í hesum umfari, men fyri tann skuld eru tær ikki gloymdar.

### Ein nýggj tíð

Jógvan I. Olsen sigur, at nú hann ikki longur er við í vinnulívi, men stendur á síðulinjuni og fylgir gongdini, fegnast hann um, at tað eru fólk, sum vilja og tora at taka tøk – eisini stór tøk, sum tað er at gera so stórar íløgur í vinnulív.

Sjálvur eigur Jógvan enn ein minni part í línuskipinum, Mascot, men er annars leysur av øllum vinnulívi.

– Jú, tað er so vist, at váði er í slíkum íløgum, men vit vóna øll, at hetta eru góðar íløgur, sum verða til gagns fyri felagið, ið eigur íløgurnar, fiskimenn og samfelagið sum heild.

Jógvan veit ikki, hvat tað hevur kostað P/F Framherja at keypa Krúnborg og tey rættindi, skipið hevur, men hann ivast onga løtu í, at talan er um eina rættiliga stóra íløgu, sum sonurin og verdóttirin saman við íslendingum hava gjørt.

– Vit, sum eru úr einum øðrum ættarliði, duga ikki rættiliga at ímynda okkum, hvussu so stórar íløgur skulu fáast at hanga saman. Men her er ivaleyst talan um framtíðaríløgu, har nógv verður goldið fyri tey veiðirættindi, sum skipið hevur.

Jógvan vísir á, at soleiðis, sum gongdin við uppisjóvarfiski er í løtuni, bendir mangt á, at hesin fiskur veksur í virði – við teimum møguleikum, sum í dag vísa seg at vera við meirvirking umborð.

– Við meirvirking kann meira fáast burtur úr hvørjum tonsi, og hetta merkir so aftur, at kvoturnar gerast meira verdar, sigur hann.

Jógvan I. Olsen ásannar tó, at hetta er ein heilt onnur tíð, har torført er hjá honum og øðrum, sum áður hava fingist við skiparakstur, at fylgja við.

– Vit síggja jú, at fólk glaðbeint seta pening í oljufeløg, sum geva undirskot. Hetta er nakað, sum vit, ið hoyra til eitt annað ættarlið, ikki rættiliga duga at skilja.

### Nýggj tøkni

Hann vísir eisini á tøknina, sum í hasara tíð var ein býur í Kina, sum hann tekur til.

– Vit, sum eru komin upp í árini, eru analfabetar, tá ið ræður um tøkni. Eg vil siga, at vit soleiðis eru sett uttanfyri, sum Jógvan I. Olsen málber seg.

Fyrrverandi skiparin og løgtingsmaðurin leggur dent á, at tað, sum ikki gongur frameftir, stagnerar – og at enda gongur aftur á.

– Tíðin gongur sína leið, og inflatión er í tíðini. Hinvegin kann vera rætt við hvørt at stabilisera seg, sum Jógvan I. Olsen tekur til.

Hann vísir á, at teir gomlu skipararnir luktaðu, hugdu og hoyrdu, og soleiðis fingu teir eitt serstak innlit í náttúruna.

– Í dag finnir nýggja ættarliðið út av øllum hesum við tøkni, sigur Jógvan I. Olsen.